HEILSUMÁLARÁÐIÐ

Heilsumálaráðið
Eirargarður 2
100 Tórshavn

20. juni 2013
**Mál**: 12/00632-4
**Tygara Skriv**:
**Viðgjørt**: Símun J. Hansen

# Vegleiðing

**Vegleiðing um heilivágskeyp av tilskotsheimilagum heilivági hjá einstaklingum staddir í Danmark**

Føroyingar, ið fara uttanlands hava ábyrgd av, at taka heilivág við til teir dagarnar, teir eru uttanlands.

Keypa ferðafólk - ið eru uttanlands í egnum ørindum – og fylgjarar heilivág, er tað fyri egna rokning, og Heilsutrygd veitir ikki stuðul uttan so, at heilt serlig viðurskifti gera seg galdandi.

Persónar, sum av sjúkrahúsverkinum vera sendir av landinum, eru at rokna sum innlagdir, inntil viðgerð á sjúkrahúsinum er endað ella, at viðkomandi er aftur á t.d. Hotel Tórshavn til víðari ambulanta viðgerð.

Tað vil siga at heilivágur í samband við viðgerðina verður goldin og skipaður av sjúkrahúsverkinum. Annar heilivágur, sum persónurin hevur brúk fyri og sum ikki er í samband við viðgerðina, skal keypast og skipast av persóninum sjálvum.

Persónar, búsitandi í Føroyum, staddir í Danmark í egnum sjúkuørindum, kunnu keypa resept-heilivág á donskum apoteki. Gjaldskvittanin og avrit av resept fyri keypið skal sendast Heilsutrygd, sum rindar peningin aftur samsvarandi heilivágsstiganum.

Somu persónar kunnu eisini, í serligum føri fáa heilivág sendandi úr Føroyum, um teir eru í uppisetri við heilivági við at seta seg í samband við danskan ella føroyskan lækna og biðja um at fáa sent resept til føroyskt apotek til avgreiðslu. Heilsutrygd rindar flutningin.

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304050 • Fax: +298 304025 • E-mail: hmr@hmr.fo

Legg til merkis, at fylgjarir ikki fáa endurrindað útreiðslur frá Heilsutrygd uttan í heilt serligum førum.

Omanfyri nevnda vegleiðing er góðkend av landsstýrismanninum.

Góðkent tann 21. juni 2013

Karsten Hansen, landsstýrismaður

/Turid Arge, aðalstjóri